LAGT TIL RÆTIS: EYÐUN KLAKKSTEIN

Eli Hentze, B71:

Mennandi at smá feløg kunnu vera við

Onkurvegna er tað mennandi, at smá feløg sum EB/Streymur, LÍF og B71 hava møguleika at vera við í bestu deildini, sigur Eli Hentze, sum er ímóti at lækka talið av liðum í bestu deildini



Eli Hentze er ein av teimum, sum hædi hevur og fer at tala ímóti eini lækking av liðunum í 1. deild. Tað fer at miðsavna fóltbóltin ov nógv, heldur hann

Mynd: Eyðun Klakkstein

Eli Hentze hjá B71 er ein av teimum, sum er ímóti, at talið av liðum í 1. deild verður lækkað.

Hann hevur áður talað ímóti við avgjørdum vendingum, og hann er framvegis á teirri áskoðan, at tað er skeivt at lækka talið.

– Tað sum hendur, um vit fáa eina kapping við 6 ella 8 liðum er, at vit fá eina eitt sindur áhugaverdari kapping reint fótbóltsliga, men fyri heildina verður tað óinteressant, sigur hann.

– Ein avleiðing kann vera, at fótbólturin nærmast doyr út í pørtum av landinum, tí feløgini í ávísum umráðum ongan møguleika hava at vera við millum tey best.

– Onkursvegna er tað, mennandi at smá feløg sum EB/Streymur, LÍF og B71 hava møguleika at vera við í bestu deildini.

– Eg hugsi kanska eitt sindur egoistisk, tí eg veit at B71 fær trupulleikar, um bert 6 lið skulu vera í 1. deild, og eg vil ikki hava, at B71 ongan møguleika hevur fyri at vera í 1. deild.

Saknar góð argument

Eli Hentze saknar góð argument fyri at broyta landskappingina.

– At betra um dygdina í føroyskum fótbólti er tengt at okkara luttøku í altjóða fótbólti, men um vit hava 6 ella 10 lið í 1. deild, so verða vit ikki betri enn eitt vist, og vit fara aldri at vinna á Spania, sigur hann.

– Í løtuni virkar tað, sum øll fótbóltskappingin verður løgd til rættis eftir 18 landsliðsspælarum. Tað eru nógvir fótbóltsspælarar sum nú venja í myrkri, kulda og regni, bara fyri at hava kappingina koyrandi longri, og so skal tøkkin vera, at teir ikki longur sleppa at vera við í bestu deildini.

At toppliðini vinna stórt á botnliðunum er tað ikki eitt gott argument fyri at lækka talið av liðum í 1. deild?

– Slík úrslit koma fyri allastaðni. Í Englandi vann Liverpool herfyri 5-1 á Chelsea, og bæði tey liðini eru topproffesionell lið. At HB vinnur 9-2 á TB er ikki tí at munurin millum tey liðini er so stórur, men heldur tí at TB'arnir hava mist mótið.

– Jens Martin Knudsen førdi herfyri fram, at teir iki fingu nóg stóra mótstøðu, og so fara vit norður til Gøtu og fáa javnleik. Tað er ov bíligt at føra slíkt fram, og eg má spyrja, hvat teir í grundini billa sær inn, at siga soleiðis, sigur Eli Hentze.

Missa nógv ítróttarliga

Eli Hentze sigur seg duga at síggja eina ætlan við at minka um liðini í 1. deild, men hann heldur ikki, at tað fer at gagna føroyskum fótbólti sum heild.

– Vit fara at missa nógv ítróttarliga, og fótbólturin verður miðsavnaður á nøkrum stórum plássið. Endamálið eigur heldur at vera, at gera umstøðurnar so góðar sum gjørligt fyri øll.

– Skulu vit minka um liðini í 1. deild, so kundi tað hent við at lagt saman nøkur feløg, og so kanska minka talið til 8, men tað skal henda natúrliga.

– Eitt nú mátti tað verið upplagt, at feløgini í Suðuroynni løgdu saman, so at har vóru tvey sterk feløg, sum kundu klára seg í 1. deild. Eg havi sæð, at góðir spælarar eru at finna í bæði Sumba og Royn, og teir kundu komi til sín rætt á liðum í hægri deild. FS Vágar hevur trupulleikar, men kanska er tað bara tí at sørvingar mangla.

– Hugsa við reint fótbóltsliga, so er tað helst rætt at lækka talið á liðum í 1. deild, men tað verða tey smáu feløgini, sum vera við sviðu soð, sigur Eli Hentze hjá B71.

Finnur er avgjørdur

Vil hava færri lið í ovastu deildunum

Finnur Helmsdal, ítróttarskrivari, er ein av teimum, sum hevur avgjørda hugsan um hvussu nógv lið skulu vera í 1. deild hjá monnum.

Fyri fjúrtan døgum síðani hevði hann grein í Oyggjatíðindum, har hann veruliga sigur sína hugsan um føroyskan fótbólt og kappingarskipanina, vit í løtuni hava.

»Vit hava seinastu tríggjar vikurnar sæð, at føroyskur 1. deildarfótbóltur er á einum ótrúliga lágum støði, og mesta orsøkin til tess er, at alt ov nógv av liðunum als ikki eru góð nokk til at spæla í hægstu deildini,» skrivar Finnur Helmsdal millum annað í greinini í Oyggjatíðindum.

»Fýra tey ovastu liðini hava 1. deildarstatus, og væl tað, tey eru GÍ, KÍ, HB og B36. Síðani koma VB, ÍF og B68, sum hava prógvað, at tey kunnu, men tó eru ov óstøðug m.a. vegna ov lítlan spælarahóp. B71, TB og FS Vágar eru í løtuni langt frá 1. deildarstøði. TB og FS Vágar eru so mikið vánalig, at tey eru beinleiðis oyðileggjandi fyri endaspurtin í deildini...«

Finnur Helmsdal heitur á fólk, sum varða av fótbóltinum, um at lesa skriftina á vegginum áðrenn tað er ov seint.

»Føroyskur fótbóltur megnar stutt og greitt ikki at hava 10 lið í trimum teimum ovastu deildunum. Vit hava ikki spælararnar, vit hava ikki venjararnar, vit hava ikki áskoðararnar, og vit hava ikki pengarnar. Neyðugt er, at bygdir fara at samstarva á fótbóltsøkinum, annars verður endin tann, at trý, fýra lið fara avstað við øllum.«

»Fótbóltsleiðarar eiga tí at semjast um at lækka talið á liðum í trimum teimum ovastu deildunum soleiðis, at tey einaferð verða seks í hvørjari deild. Verður tað gjørt, fara bygdirnar náttúrliga at samstarva, og so fáa vit bráðliga eina krútsterka 1. deild, eina sterka 2. deild og eina áhugaverda 3. deild. Nú líkist eingin deildin nøkrum, skrivar Finnur Helmsdal.

Teir royndu á aðalfundinum í 1994

Á aðalfundinum hjá FSF í 1994, var uppskot lagt fram um at broyta bygnaðin í landskappingini hjá monnum, men uppskotið fekk onga undirtøku

Leingi hevur verið tosað um at lækka talið á liðum í ovastu deildunum, og seinast hetta var viðgjørt í rætta høpinum (aðalfundinum hjá FSF), var í 1994, tá orðaskifti um broyting í bygnaðinum varð hildið.

Jens Erik Magnussen legði vegna FSF eitt uppskot um broyting í bygnaðinum í landskappingini fram. Ætlanin var ikki at samtykkja nakað, men fáa feløgini at viðgera uppskotið, og var áhugi fyri tí, kundi eykaaðalfundur verða fyriskipaður seinni, at gera broytingar í kappingini.

Torleif Sigurðsson, formaður í FSF, segði, at ætlanin var at fáa at vita frá feløgunum, hvat tey hildu um eina broyting, tí var eingin áhugi fyri tí, so var eingin orsøk at spilla tíð til at viðgera málið næstu fýra, fimm árini.

Síðani komu nakrar meiningar frá feløgum, og tað var einki at fara skeivur í. Umboð fyri B71, B36, TB tóku orðið og talaðu ímóti. Umboð fyri TB og GÍ vóru mest sum á einum máli um, at tað fór at vera ógjørligt at lækka talið aftur, nú tað var hækkað.

Fundarstjórin gjørdi eftir eina løtu við kjaki niðurstøðuna, at neyðugt var ikki at taka uppleggið um broyting fram aftur í nærmastu framtíð, soleiðis sum hann hevði skilt orðaskifti.

Og tað er har vit eru nú. Eingin ætlan er at broyta kappingarskipanina, og skal hon broytast, skal ein meiriluti á aðalfundi hjá FSF gera tað, og tað verður trupult, fyri ikki at siga ógjørligt.

Soleiðis sá eitt av uppskotunum um nýggja kappingarskipan fyri 1. deild út

Uppskot um spæliskipan við 8 liðum

Grundspæl 14 dystir

MEISTARADEILD
A1
A2
A3
A4
A5
A6
A7
A8

Eitt lið kann flyta niður

Endaspæl 6 dystir

	stig	mál
A1	4	0-0
A2	3	0-0
A3	2	0-0
A4	1	0-0
A5	4	0-0
A6	3	0-0
A7	2	0-0
A8	1	0-0

1-4 spæla dubultumfar um FM

5-8 spæla dupultumfar um niðurflyting

Nr.8 spælir tveir kvalifikatiónsdystir móti nr. 1. deild